## DAGSINS MEINING

### Blómandi tónleikalív

Havnar Hornorkestur kom aftur av tónleikastevnu fyri hornorkestur sum Europameistari í sínum bólki. Hetta er eitt musikalskt bragd, ein stórur heiður fyri alt landið og enn eitt dømi um, at føroyskt tónleikalív stendur í besta blóma. Føroysk talent gera seg galdandi uttanlanda og fleiri eru av álvara á veg móti stjørnunum. Hetta er galdandi fyri klassikan eins væl og fyri rútmiskan tónleik.

Her heima á landi blómar tónleikalívið í musikkskúlum, kórum, orkestrum, ensemblum og rútmiskum bólkum av øllum møguligum sløgum. Bara fyri at nevna nøkur, Lisa Ekdahl og Jethro Tull. Nú summarið er í hondum koma festivalar, summartónar og onnur tónleikatiltøk, har føroyskir og útlendskir bólkar og einstaklingar sleppa at vísa sítt kynstur fyri føroysku áskoðarafjøldini. Hetta er ein sera positiv gongd, sum vónandi verður stuðlað av avvarandi myndugleikum.

Eitt blómandi tónleikalív er sunt og mennandi fyri likam og sál hjá ungum og gomlum. Tað lívgar um alla staðni, ikki bara hjá teimum, sum spæla og syngja, men so sanniliga hjá øllum øðrum eisini. Einki er so lívgandi og gevandi fyri sálina sum góður tónleikur.

Hetta vikuskiftið verður enn ein stór tónleikahending. Tá verður stovnandi aðalfundur í MENTÓN, sum herfyri hevði fyrrreikandi fund í Skansastovu í Havn. Eitt frálíkt tiltak, sum øll, ið hava áhuga fyri og er góð við tónleikin og tónleikararnar her á klettunum, eiga at stuðla. Við hesum senda vit øll góð lukkuynski til hetta góða tiltak.

Ítróttur, politikkur, vinnulív. Ja hetta er vorðin ein partur av gerandisdegnum hjá okkum øllum. Men við tíðini hevur eisini tónleikurin og tónlistin fingið fastatøkur í okkum og allari tjóðini. Gott í tykkum, sum gera tykkara til at menna tónleikin her á landi, hvør í sínum lag. Hann eigur at vera javnsettur um ikki raðfestur hægri enn so mangt annað, sum rørist í hesum vælsignaða samfelag.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ríkisfelagsskapurin tryggjar føroyingum í Danmark skerpikjøt

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



1. mai fingu føroyingar og grønlendingar, sum annaðhvørt eru búsitandi-, ella til sjúkraviðgerð í Danmark ein nýggjan møguleika, hvat heimligum matvørðum viðvíkur.

Føroyingar í Danmark hava higartil havt trupult við at fáa fatur á til dømis føroyskum skerpikjøti, av tí at Føroyar og Danmark standa hvør sínu megin ES-markið. ES hevur, av ótta fyri djórasjúkum, ógvuliga strangar reglur viðvíkjandi innflutningi av kjøti úr londum, sum standa uttanfyri ES. Men hesin trupulleikin er nú loystur.

Føroyska- og grønlendska heimastýrið hava saman við donsku matvørumyndugleikunum funnið eina loysn, sum millum annað gevur føroyingafeløgum í Danmark møguleika at innflyta føroyskar matvørður, sum kunnu latast víðari til felagslimirnar. Somuleiðis kunnu sjúklingahotel innflyta ávikavist føroyskar- og grønlendskar matvørður.

Einasta orsøkin til at matvørur úr Føroyum og Grønlandi (sum ikki eru ES-lond) kunnu innflytast í Danmark (sum er limur í ES), er at Føroyar og Grønland eru í ríkisfelagsskapi við Danmark.

Høvdu Føroyar verið fullveldi uttan ES-limaskap, so høvdu føroyingar í Danmark verið noyddir at hildið seg til danskar matvørur, men takkað verið ríkisfelagsskapinum kunnu teir nú eta so nógv skerpikjøt sum teir hava hug til.

Hetta er enn eitt dømi um, at samstarv gevur okkum fleiri møguleikar enn vit kunnu vinna við at dyrka ósemjur.

# Suð á konsertferð í Eysturoy

**Kvinnukórið, Suð, fer leygardagin at hava fýra konsertir í Eysturoynni. Í septembur verða tvey ár, síðani kórið byrjaði at venja, og hevur tað hesa stuttu tíð eydnast teimum at gjørt seg kendar her hjá okkum**

KONSERTFERÐ
*Rúna Sivertsen,*
*runa@sosialurin.fo*

Í samband við samanleggingina av Oyndarfjarðar-, Skála og Runavíkar Kommunu, fer kvinnukórið, Suð úr Klaksvík, undir leiðslu av Steinvør Fonn, at hava fýra konsertir í Eysturoynni.

Í septembur verða tvey ár, síðani Suð byrjaði at venja. Hesa tíðina hava tær verið sera virknar og hava sungið til konsertir í Klaksvík, Gøtu, Mentanarhúsinum í Fuglafirði og í Kommunuskúlanum í Havn.

Eisini hava tær sungið til nógv onnur høvi, eitt nú á matiné'um, til vígslur, jarðarferðir, hátíðarhald, ábyrgdaraveitslur og stórar føðingardagar.

Fyri stuttum sungu tær til setanina av stóru KT-stevnuni, sum var í Norðurlandahúsinum.

Leygardagin fer kvinnukórið á rundferð í Eysturoynni. Fyrst verður farið til Elduvíkar, síðani til Oyndarfjarðar, Skála og Runavíkar.

Á konsertunum, sum verða um 40 minuttir hvør, fara tær at syngja sálmar og sangir, kend negro spiritual umframt kend klassisk stykki.

Eisini verða sangir úr vælumtókta sangleikinum "The Sound of Music" og úr sangleikinum "Chicago" á skránni. Tað er Jóhannes Andreasen, sum hevur klaverfylgispælið.

Vilt tú vita meira um kvinnukórið, Suð úr Klaksvík, kanst tú leita inn á heimasíðu teirra, www.sud.hello.to

**Konsertirnar leygardagin 8. mai verða hesar:**

Klokkan 14.30 í Elduvíkar kirkju
Klokkan 16.00 í Oyndarfjarðar skúla
Klokkan 18.00 í Skála skúla
Klokkan 20.00 í Runavíkar skúla

Leiðari: Steinvør Fonn
Sangarar:
Henny Gerðalíð
Gunvá við Keldu
Hansa Sivertsen
Joan Høj Jacobsen
Tove Vitalis
Assa Færø
Unnur S. Fonn
Tóra við Keldu
Mása Tróndheim
Ásla Fonn
Hildegunn Mortensen
Erla Petersen
Súsanna Sivertsen
Jónfríð Foldbo
Martha Mýri
Simona Johannesen




**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



# Javnstøðumál eru samfelagsmál

**Í sambandi við at tað í ár eru 10 ár síðani javnstøðulógin kom í gildi, skipar Javnstøðunevndin fyri almennari ráðstevnu í Norðurlandahúsinum mánadagin 10 mai undir heitinum "Á leiðini til Javnstøðu."**

HÁTÍÐARHALD.
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

– Í teimum flestu londunum rundanum okkum kom javnstøðulóggáva í gildi miðskeiðis í 70 unum. Vit darlaðu also eini 20 ár aftaná. Men lógin kom, og hevur nú 10 ár á baki. Hvussu stendur so til við javnstøðuni? Ikki væl, um vit halda fram við at samanbera okkum við okkara grannalond.

Soleiðis hugleiðir Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í javnstøðumálum, í faldaranum til ráðstevnuna. Enn er nakað eftir á mál, men vit eru á rættari kós, og hyggja vit at skránni, má hendan ráðstevnan sigast at vera eitt virðiligt og viðkomandi fet á leiðini til javnstøðu.



*Vigdís Finnbogadóttir verður við á ráðstevnuni*



*Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður við javnstøðumálum, fer at tosa um visiónir fyri javnstøðu*

### Minnast Maritu

Byrjað verður við at Jóannes Eidesgaard, løgmaður og fyrrverandi landsstýrismaður í javnstøðumálum, setur ráðstevnuna. Aftaná hann fer ongin minni enn Vígdis Finnbogadóttir, fyrrverandi forseti Íslands, at hugleiða um, hví og hvussu javnstøða skal fremjast í verki.

Á ráðstevnuni fer javnstøðunevndin eisini at nýta høvið at minnast Maritu Petersen, sála, fyrrverandi løgtingsformann og løgmann, fyri hennara arbeiði fyri javnstøðu - bæði sum politikari og sum fyrimynd. Marita Petersen var løgmaður, tá javnstøðulógin kom, og legði hon stóra orku í at fáa lógina samtykta.

Tey flestu av okkum minnast ivaleyst, hvussu stríggið tað var, at fáa javnstøðulógina samtykta. Toganin aftur og fram í løgtinginum tók drúgva tíð, og á stevnuni verður tað Bjørt Samulesen, journalistur, sum fer a t greiða frá arbeiðinum hinumegin politisku leiktjøldini.




### Kvinnulig leiðsla

- TDC vil hava fjøltáttaðar leiðsluhættir og nýhugsan. Og hetta eru fleiri kvinnuligir leiðarar millum annað við til at skapa, sigur Henning Dyremose, stjóri í Tele Danmark, sum verður næst á skránni, har hann fer at greiða frá egnum royndum við góðari kvinnuligari leiðslu í TDC.

Síðani fer Jóhanna á Bergi, sølustjóri í JFK, at greiða frá sínum royndum, sum kvinnuligur leiðari. Jóhanna hevur ikki verið so nógv at sæð í fjølmiðl-unum, og tí munnu tey vera fá, sum vita, at hon er einasta kvinna í ovastu leiðsluni í føroysku fiskivinnuni.

### Visiónir

Úr Íslandi hevur javnstøðunevndin eisini fingið Birgir Bjørn Sigurjónsson, Human Ressource Manager í Reykjavíkar býráð, at tosa um lønarskipanina, sum bjóðar líka løn fyri líka arbeiði. Eitt mál, sum sjálvsagt altíð hevur verið eitt av aðalmálunum í javnstøðuarbeiðinum.

Tá tosað verður um javnstøðu, koma vit neyvan uttan um spurningin um, hvussu vit best sameina arbeiðs- og familjulív og tíð til ein sjálvan. Hetta verður ivaleyst eisini ein av teimum spurningunum, sum koma at mynda javnstøðukjakið í framtíðini, og tí verður tað ein framtíðargranskari, nevniliga Gitte Larsen frá Køvenhavns Institut for fremtidsforskning, sum fer at hugleiða um hetta evnið.

### Siðvenja og átrúnaður

- Vit mugu syrgja fyri, at lítlar gentir og lítlir dreingir ikki fyrst og fremst verða uppald sambært teirra kyni, men heldur sambært teirra einstøku persónligheit, sigur Durita Holm, sosialantropologur, og hetta verður nakað av tí, Durita fer at koma inn á í sínum fyrilestri um javnstøðu og siðvenju.

Siðvenja snýr seg um hugburð, og júst okkara hugburður er ofta ein tann største men minst ítøkiliga forðingin fyri veruligari javnstøðu. Í Føroyum er hugburðurin til so mangt, ikki minst leiklutin hjá kvinnum og monnum, merktur av okkara átrúnaðarligu sannføring. Í hesum sambandi fer Jógvan Fríðriksson, prestur, at tosa um javnstøðu sæð út frá einum kristiligum sjónarhorni.

### Lógvatak?

Annika Wardum Joensen, forkvinna í Javnstøðunevndini, endar ráðstevnuna við eini innbjóðing til, at vit øll taka lógvatak saman í arbeiðinum fyri javnstøðu í Føroyum. Annika hevur fleiri ferðir gjørt vart við, at javnstøðumál ikki er tað sama sum kvinnumál. Javnstøðumál eru samfelagsmál, og í samfelagsmálum mugu vit øll, kvinnur og menn, politikarar og vinnulív, ja allir samfelagsbólkar samstarva fyri at røkka úrslitum. Samstarv og semja eru lyklaorðini á leiðini til javnstøðu, har javnstøða ikki longur er eitt stríðsmál, men eitt felagsmál, sigur Annika W. Joensen.

Ráðstevnan í Norðurlandahúsinum byrjar kl. 8.30 og endar kl. 16.45.

Beint áðrenn kaffisteðgin seinnapartin syngur Eivør Pálsdóttir.

